

## Mamma noktar at svara

Kate McCann sýtti fyri at svara 48 spurningum um tilburðin, tá dóttirin Madeleine hvarv. Tað skrivar bretska blaðið The Sun, sum hevur havt høvi at kanna tað, sum portugisiska løgreglan fekk burturúr, tá hon avhoyrdi foreldrini hjá Madeleine McCann. Blaðið skrivar, at Kate McCann noktaði at svara øllum spurningum, sum hon fekk, eftir at løgreglan hevði sagt, at hon og maðurin, Gerry, vóru undir illgruna í málinum. Foreldrini eru ikki undir illgruna longur, tí portugisiska løgreglan hevur lagt málið til viks. Foreldrini hava kortini boðað frá, at tey fara at halda fram við sínum kanningum. Í gjár fingu fjølmiðlafólk atgongd til tað umfatandi skjalatilfarið hjá portugisisku løgregluni í Madeleine-málinum. Talan er um næstan 30.000 síður. Bretska sjónvarpið Sky vísti í gjár myndir av hotelkamarinum, haðani Madeleine McCann hvarv tann 3. mai í fjør.




*Hereftir verður ikki looyvt at smakka sær á yvirhøvur, tá ið ein koyrir bil, men tað má framvegis verða loyvt at eta ein tallerk av romm-fromasju, uttan at missa korikortið*

# Nú verður strangari at drekka og koyra bil

**Nú er ætlanin at seta nógv strangari lógir í gildi fyri rúsdrekka-koyring og fleiri onnur tiltøk skulu eisini setast í verk fyri at bøta um ferðslu-trygdina og bøturnar skulu verða nógv hægri enn tær eru nú**

FERÐSLUTRYGD
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú fer tað at verða nógv strangari at drekka og at koyra bil.

Bjørt Samuelsen, landsstýriskvinna í vinnumálum, fer í heyst at leggja fleiri uppskot fyri Løgtingið fyri at bøta um ferðslutrygdina.

Enn er ikki heilt greitt, hvørji uppskotini verða, tí enn eru tey ikki komin til politiska viðgerð.

Men í løtuni situr umsitingin í vinnumálaráðnum og arbeiðir við ymsum møguleikum og Bjørt Samuelsen sigur, at í øllum førum er greitt, at fleiri uppskot fara at verða løgd fyri Løgtingið í heyst.

Tað er eisini greitt, at eitt tiltak, sum landsstýriskvinnan ætlar at seta í verk, er at lække promillumarkið.

Í løtuni er promillumarkið 0,5, men nú verður tað so lækkað.

Bjørt Samuelsen dugir ikki at siga beint nú, hvussu langt niður tað fer, men niður á 0,2 er eitt gott boð.

Tað verður í øllum førum ikki sett heilt niður á null, tí tað skal so ómetaliga lítið til, fyrr enn at rúsdrekka kann ávísast í blóðinum og tað má framvegis verða loyvt at eta ein tallerk av romm-fromasju uttan at missa koyrikortið.

Tað er onki at ivast í, at tað verður ofta hugsað um, at tað ber til at drekka eina øl, ella tvær veikar øl og framvegis koyra bil.

- Við at lække promillumarkið, senda vit tann greiða boðskap, at rúsdrekka og bilkoyring hoyra ikki saman og at tað skal altso als ikki vera loyvt at drekka yvirhøvur, tá ið ein koyrir bil, sigur Bjørt Samuelsen.

Samstundis verður kanska eisini ásett, at tað verður null-mark fyri øðrum rúsevnum í blóðinum, tá ið ein koyrir bil.

### Øll í trygdabelti

Samstundis er ætlanin at gera tað til eitt krav, at øll, sum eru í einum bili, skulu brúka trygdarbelti.

Í løtuni er støðan tann, at einasta krav er, at fólk hava ikki loyvi at sita leysa í bili uttan so, at øll trygdarbeltini eru í brúki. Tað merkir, at eru fleiri fólk í einum bili, enn tað eru trygdarbelti til, kunnu tey sita leys, bara tey ikki eru til ampa fyri bilføraran.

Men eftir nýggju krøvunum, verður tað ólógligt at hava fleiri fólki í einum bili, enn tað eru trygdarbelti til.

Men Bjørt Samuelsen sigur, at í hesum sambandi verður helst neyðugt at gera onkra tillaging fyri ikki at koma teimum, sum hava eldri bilar, í óføri, tí summir eldri bilar hava ikki trygdarbelti á baksetrinum.

Tað er eisini ætlanin at bøturnar fyri at bróta ferðslulógina, skulu verða væl hægri, enn tær eru nú, tí í løtuni verða brot á ferðslulógina sektað nógv linari í Føroyum, enn tey verða í okkara grannalondum.

# Hækka aldurin at taka koyrikort upp í 21 ár

**Koyrilærari heldur, at fyri at bøta ferðslutrygdina, er tað vert at umhugsa at hækka aldurin at taka koyrikort og at keypa rúsdrekka, upp í 21 ár**

FERÐSLUTRYGD
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Fyri at bøta um ferðslutrygdina, eiga politikarar eisini at umhugsa at hækka aldursmarkið fyri bæði at taka koyrikort og at keypa rúsdrekka, upp í 21 ár.

Tað heldur Benny Ejdesgaard, koyrilærari.

Hann sigur, at ein amerikansk kanning vísir, at verður aldursmarkið at keypa rúsdrekka, hækkað upp í 21 ár, slepst undan heilt nógvum ferðsluvanlukkum við rúsdrekka uppi í.

- Tað kundi verið vert hjá politikarunum at kanna eftir, um tað sama er galdandi her hjá okkum og øll tiltøk, sum kunnu føra við sær, at ferðsluvanlukkurnar verða færri, eru avgjørd verd at umhugsa, sigur koyrilærarin.

Somuleiðis heldur Benny Ejdesgaard, at aldursmarkið at taka koyrikort, skuldi verðið hækkað upp í 21 ár.

- Tá er størri møguleikin fyri, at ungdómar hava fingið ringastu øðina úr kroppinum og eru stillaðir nakað. At koma beinleiðis av skutara í tvey ár og í bil, er eitt ov stórt lop og øll vita, hvussu buldrasligir teir ungu bilførararnir kunnu vera og tað eru eisini teir, sum elva til nógvar vanlukkur.

### Hámarksferðin broytast

Annars tekur Benny Ejdesgaard fult undir við, at promillumarkið verður sett niður á 0,2 og at tað verður eitt krav, at øll skulu sita í trygdarbelti.

Men hann heldur eitt tað samstundis er vert at umhugsa at broyta hámarksferðina hjá stórum bilum.

- Sum er, kunnu lastbilar og aðrir stórir bilar, koyra 70 kilometrar um tíman og tað er tað ringasta, sum er, tí persónbilar kunnu koyra 80.

- At lastbilar koyra 70 og persónbilar 80, ger, at yvirhálingar gerast óneyðuga drúgvar og sostatt eisini óneyðuga vandafullar. Tí er ein møguleiki, at lastbilar antin ikki skulu hava loyvi at koyra meiri enn 60, tí tað ger tað nógv skjótari og vandaleysari at yvirhála.

Hin møguleikin er, at lastbilarnir eisini sleppa at koyra 80, tí so verður tað óneyðugt at yvirhála.

- Men tað, sum er allarmest neyðugt, er at fáa eina koyritekniska breyt, har bilførarar undir tryggum umstøðum læra at koyra í hálku og á vátum vegi og læra, hvussu bilurin uppførir seg í ymsum líkindum, leggur hann afturat.

Sjálvir hellur hann til tað seinasta, tí vegirnir eru so góðir í dag, at tað ber til hjá tungum bilum at koyra 80 næstan allastaðni. Har líkindi ikki eru til tað, ber tað so til at lække ferðina við skeltum.